Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Endurlýsing eftir pedagogi til Bústovnin á Eirargarði 16A/BN

Bústovnurin á Eirargarði 16A/16BN søkir eftir pedagogi til farloyvisstarv við setan 1.5. til 31.03.2009, ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv, 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Eirargari 16 A/BN
FO-100 Tórshavn
Stílað: Bjørg Mohr, leiðari

**Umsóknarfreist: 18. apríl 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Eitt starv sum sjúkrarøktarfrøðingur við einari arbeiðstíð uppá 0,7 tíð í skiftandi vaktum er leyst til setan frá 15. mai 2008.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Thyru Thorsteinsson fyristøðukvinnu tlf 34 33 00 3215 ella Sonny Ellendersen deildarsjúkrarøktarfrøðing tlf. 34 33 00 lokal 3210

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, autorisatión, ummælum og CV skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

**Umsóknarfreist 21. apríl 2008.**

---

i
Sosialurin

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

---

# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Summarferiuavloysarar

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Pleygarar**
**Heilsurøktarar**
**Sjúkrahjálparar**
**Heilsuhjálparar**
**Ljósmøður**

Søkt verður eftir starvsfólki til fulltíðar og parttíðar feriuavloysarastørv í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum 1. juni 2008 til og við 31. august 2008.

**Økini, ið tørva summarferiuavloysarar í ár, eru:**
- intensiv deild og skaðastova
- føðideild/præmaturstova og ljósmøðraskipanin
- operatiónsdeild (við tilkallivakt frá bústaði/kamari)
- hæmodialysu ambulatorum
- geriatrisk deild
- hjartadeild
- barnadeild, børn 0 -14 ár
- kirurgisk, medisinsk og psykiatriskar seingjadeildir

Vit ynskja ágrýtin røktarstarvsfólk við dirvi, góðum samstarvsevnum og evnum til at virka sjálvstøðugt.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 304500 til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing:
- Nainu Túgvustein, Skurð- og akutt depilin, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo
- Ása Poulsen, Medisinski depilin, lokal 6102, lsasapo@ls.fo
- Bergit Weihe, Psyk. depilin, lokal 4102, lsberwe@ls.fo
- Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, lseydja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 6. mai 2008 kl. 12.00**

## Læknaskrivari

Á Røntgendeildini er eitt fulltíðarstarv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. mai 2008 ella eftir nærri avtalu.

Alt røntgenvirksemið í Føroyum er talgildað, og skrivaravirksemið er savnað á Landssjúkrahúsinum. Umframt vanligar røntgenkanningar og ultraljóðskanningar verða eisini gjørdar mammografiir, CT-skanningar og MR-skanningar.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góðan røkjuskap
- góðan teldukunnleika

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Marius Rasmussen, leiðandi yvirlækna, lokal 5513.

**Umsóknarfreistin er 21. apríl 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G1**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008 kl. 12.00

**Reingerðarfólk**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008 kl. 12.00

**Radiografar/ Røntgensjúkrarøktarfrøðingar**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 15. apríl 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B6**
Umsóknarfreistin er 16. apríl 2008 kl. 12.00

**Deildarleiðari til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 28. apríl 2008

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo